# Kanna umstøðurnar áðrenn vit skriva undir Kyoto



*Eyðun Elttør stæddur á oljuráðstevnu í Stavanger. Aftanfyri nýggja gistingarhúsið, sum hevjar seg upp um hølllirnar, har oljumessa og ráðstevnan ONS er annaðhvørt ár*

*Mynd Jan Müller*

**- Tað er skeivt, at vit í Føroyum bara skulu siga ja ella nei, tá aðrir gera tað. Vit mugu fyrst hava eitt grundarlag at taka støðu út frá, tá tað ræður um CO2 og hava tí biðið um fyrivarni at seta Kyotoavtaluna í gildi, til vit hava betri tøl at grunda okkara avgerð á sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður**

ORKA OG UMHVØRVI
*Jan Müller*

Millum føroyingarnar, sum vóru við á altjóða oljumessuni og –ráðstevnuni í Stavanger herfyri var eisini landsstýrismaðurin í oljumálum, Eyðun Elttør. Hann hitti m.a. bretska starvsbróðurin, Brian Wilson.

Eyðun Elttør sigur seg vera sera væl nøgdar við fundin og heldur fyri, at teir báðir høvdu nógv at tosa um. Serliga fegin er Eyðun Elttør fyri stóra áhugan hjá bretum at fáa nakað skilagott burtur úr einum samstarvi á oljuøkinum millum londini. Enn er ov tíðliga at siga nakað ítøkiligt um tað, tí leitingin hevur enn ikki givið verulig úrslit, men ráðharrin var sera positivur fyri einum samstarvi tvørtur um mark, um so er, at eitt oljufelt liggur báðumegin markið sigur landsstýrismaðurin. Hann metti ikki, at hetta fór at skapa stórar trupulleikar og vísti til eina felags frágreiðing, sum bretar og norðmenn hava gjørt um samstarv um felt, sum liggja í norskum og bretskum øki í Norðsjónum.

Eyðun Elttør sigur víðari, at teir eisini nomu við spurningin um samstarv á útbúgvingarøkinum, nú vit føroyingar vilja vera við í eini oljuvinnu og har m.a at fáa útbúgvið fólk til hesa vinnu. Og her eru so eisini møguleikar fyri samvinnu við Bretland.

Á fundinum buðu teir báðir ráðharrin hvørjum øðrum at vitja. Men eingin tíð er ásett til hesar vitjanir.

Landsstýrismaðurin í oljumálum, ið eisini umsitur umhvørvismál, brúkti annars høvi til at fylgja við tí pallorðaskifti, sum var á ráðstevnuni í Stavanger um framtíðar orkuloysnir við atliti til burðardygga menning. -Tað er neyðugt, at vit hugsa um umhvørvi og at vit eisini í orkuhøpi hugsa um burðardygga menning. Vit hava fingið náttúruna og umhvørvi til láns frá okkara eftirkomarum, soleiðis sum indianskur høvdingi so væl segði tað í forðum, og tað er so okkara ábyrgd at lata hetta tilfeingi aftur í sama standi sum vit fingu tað.

Í sambandi við orðaskiftið um burðardygga menning beit hann serliga merki í umrøðuna av støðuni hjá mongum menningarlondum, har tey umframt at vera sera fátøkk eisini tørva orku, her serstakliga elmegi. Hetta er nakað, sum framkomni heimurin má kunna útvega til tey, men samtíðis hevur hann ábyrgdina av, at troytanin av kolvetni til orkuendamál má vera skynsom og í tráð við krøvini til burðardygga menning. Tvs. at dálkingin má vera sum minst.

Eftir oljuráðstevnuna í Stavanger fór Elttør beina leið til Johannesburg at vera við á ráðstevnu har um burðardygga menning. Vit spurdu hann, hvussu tað ber til, at Føroyar hava biðið um fyrivarni fyri at góðtaka Kyotoavtala um útsleppin av CO2. -Eg haldi tað er skeivt, at vit í Føroyum bara siga ja ella nei, tá aðrir gera tað. Vit mugu sjálvi hava eitt støði at standa á, og tí hava vit í spurninginum um Agenda 21 og CO2 , har vit jú eingi serlig tøl hava, biðið um fyrivarni til vit hava betri tøl at grunda okkara avgerð á. Í hesum sambandi hava vit sett eina verkætlan í gongd. Um hálvt ár kenna vit betri tølini fyri Føroyar og kunnu taka eina støðu út frá tí.

Vit hava biðið um fyrivarni við at seta Kyotoavtaluna í gildi tvs. at lækka CO2 innihaldið, tí vit kunnu jú ikki bara siga ja til nakað, sum vit ikki vita nakað um. Vit mugu kenna grundarlagið, áðrenn vit siga ja ella nei.

Landsstýrismaðurin leggur eina við, at hetta hevur einki við oljuna, sum vit nú leita eftir, at gera. Finna vit olju í so stórum mongdum, at hon skal framleiðast, so mugu vit eisini hugsa um, hvat vit tá gera.

Ætlanin var eisini at hitta norska oljumálaráðharran á oljuráðstevnuni, men hetta varð tó av ongum hesaferð. Ístaðin vitjaði Elttør føroyska básin og hitti umboð fyri føroysku fyritøkurnar, ið vórðu har.



*Eyðun Elttør saman við bretska orkumálaráðharranum á oljumessuni í Stavanger herfyri*

*Mynd Jan Müller*

# ítróttur

Nr. 169 • hósdagur • 5. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Skála-venjarin uppsagdur

**Ístaðin fyri Mathias Davidsen verður hjálparvenjarin higartil, Hans Jákup Andreasen, sum saman við Jústinus Justinussen skal taka sær liðnum**

VENJARAR
*Jákup Mørk*

Týsdagin tók nevndin í Skála Ítróttarfelag avleiðingarnar av tungu gongdini, sum hevur eyðkent liðið higartil. 14 dystir uttan ein einasta sigur hava viðført, at liðið alt árið hevur verið botnproppur í deildini, og nú boðar nevndin frá, at Mathias Davidsen ikki longur er venjari hjá felagnum.

Í stuttum tíðindaskrivi verður sagt, at uppsøgnin fyrst og fremst er ein staðfesting av veruleikanum, sum sigur, at Skála er niðasta liðið í deildini. Enn er tó ikki ov seint at venda gongdini, og millum annað hevur Skála teir báðar dystirnar eftir, sum á pappírinum hava størst sannlíkindini fyri at geva stig. Nevnliga heimadystir móti EB/Streymi og TB. tí helt nevndin, at skuldi nakað stig takast, so mátti tað vera nú.

At enda boðar nevndin frá, at hjálparvenjarin higartil, Hans Jákup Andreasen, saman við Jústinus Justinussen fer at hava ábygdina av liðnum, tað sum eftir er av kappingini.

Tað kann leggjast afturat, at hetta er ikki sørt meinlíkt støðuni í fjør, tá Skála segði leikandi venjaranum, Eugen Voda, úr starvi stutt undan kappingarenda. Ta ferðina vísti avgerðin seg at vera tann rætta, og nýggju venjararnir stýrdu í seinastu dystunum Skála upp á beint, soleiðis at uppflytingin í bestu deildina fyri fyrstu ferð varð tryggjað.

### Sum í útlandinum

Yvir høvur hevur tað í ár tókst soleiðis, at trýstið á venjarastørvini gerst alsamt harðari. Støðan er mest átøk henni í útlandinum, har venjarauppsagnirnar eru títtar, um úrslitini ikki eru eftir vild.

Kappingarárið var ikki meira enn byrjað, tá TB venjarin varð sagdur úr starvi. Beint undan summarsteðginum var tað so vágbingar, sum gjørdu av at skifta, og áðrenn Skálavenjarin nú fekk sekkin, hevði eisini HB boðað frá venjaraskifti. Hartil hevur B36 í árinum knýtt nýggjan hjálparvenjara at besta mansliðnum, meðan tað longu er kent, at GÍ og B68 skulu hava nýggjan venjara til komandi kappingarár.

Sostatt tykjast tað bert vera Kurt Mørkøre í KÍ, Jógvan Martin Olsen í NSÍ og Trygvi Mortensen í EB/Streymi, sum eru komnir fullkomuliga óskalaðir ígjøgnum kappingarárið, og tað má í øllum førum sigast at vera heldur sjáldsamt.



*Mathias Davidsen er ikki longur venjari hjá Skála. Týsdagin gjørdi nevndin í felagnum av at siga hann úr starvinum*

